# Sumbiar-hjartað eigur lívið í mær

**Hóast bókaútgevarin Emil Juul Thomsen í Nólsoy hevur givið hundraðtals bøkur út, so er hann ikki komin á mál enn. Nú hann fer um tey 90 árini sunnudagin, hevur hann framvegis eitt ynski á hjartanum: At geva eina bók út um listarmannin Steffan Danielsen. - Næst eftir Mykines er hann okkara besti málari, sigur Emil.**

FØÐINGARDAGUR

*Orð/myndir: Snorri Brend*

**Nólsoy:** - Hvar hevur tú verið? Kemur tú nústaðni?!

So fattur sum nakar unglingi situr hann har við borðið. Træborðinum í egnum køki. Situr í roynd og veru og bíðar eftir blaðmanninum. Og hevur helst gjørt tað eina góða løtu.

Borðið er longu dekkað, - til tríggjar. Kaffikannan stendur á borðinum við nýgjørdum kaffi og ein góð kringla frá onkrum bakara í Havn stendur somuleiðis á borðinum.

Á borðinum liggur eisini nakað, sum Emil neyvan kann vera fyriuttan: Sigarirnar av markinum Amulet. Og ein tendrari, sjálvandi.

- Her er dekka upp til tríggjar, men eg veit ikki, Bjørn honum dámar ikki kaffi. So vit eiga bara kaffið einsamallir, vit báðir, sigur hann skemtandi á málinum.

Eg skeinki honum í koppin og síðani mær sjálvum. Hann koyrir fyrst mjólk í, síðani sukur.

- Hygg, her er bæði mjólk og sukur. Brúkar tú úti? Ikki?! So er tú ein rættur maður!

Hann fær sær ein sopa av kaffinum, setur koppin aftur á skálina, skoðar blaðmannin eina løtu og spyr so, hvar vit skulu byrja samrøðuna.

- Tú má bara tosa hart, tí eg havi heldur vánalig oyru.

Fyrsti spurningurin verður settur, og samrøðan er í gongd. Samrøðan við henda megnarmannin, sum hevur rokkið mongum málum í sínum nú 90 ára langa lívi.

Men hann er ikki liðugur við tað, sum onkur kanska vildi skírt lívsverk hansara.



*Emil hevur fingið fleiri heiðursprógv uttanlanda, og tá avmyndast skal fer hann fegin í "galla"*

### Klárur við kaffinum

Veðrið er av tí allar fagrasta henda mikumorgin í vikuni. Náttin var merkt av vindi, men nú hevur sólin kagað undan eina løtu.

Ritan leggur at bryggju í Nólsoy sum hon er von. Eg leiti mær í land, og byrji samstundis leitingina eftir húsunum hjá Emil.

Veit ikki nágreiniliga, hvar hann býr. Men tað veit bygdarfólkið sum vera man.

- Far tær niðan á ovara veg, beint niðan frá her. So sært tú eini eyðkend hús við gróti, flagtekju og úr timbri. Tú sært tey beinanvegin. Har býr Emil, svarar ein nólsoyingar mær blídliga aftur.

Rætt hevði hann. Húsini eru eyðkend og løtt at finna. Spurningurin er nú, um hesin aldrandi maðurin er á fótum. Klokkan er ikki meiri enn farin av 10.

Summum eldri fólkum dáma væl at sova nakað út á morgunin, men tað ger Emil altso ikki! Hann situr klárur við kaffinum, tá eg komi á gátt.

### Trælitir

At tað eru eini serstøk hús, sum Emil býr í, tað er eingin loyna. At talan er um eini hús í gomlum føroyskum sniði, sæst skilliga - bæði uttan og innan.

Portrið er úr træi við eini slá sum lás, og tað sama er handatakið til høvuðsdyrnar. Tú kemur innar í forstovuna, og har er mín sann enn ein træhurð við tí serstaka lásinum.

Eg pikki á dyrnar, og úr køkinum verði eg biðin at koma innar. Og har situr hann so á einum træbeinki - og hevur helst sitið soleiðis eina góða løtu og bíðað.

- Tað var uppá tíðina at tú kom. Eg var vorðin so kaffitystur av at bíða!

Eg tríni innar í køkin, og eitt tað fyrsta eg leggi merki til eru litirnir á vegginum – ella tørvin á hesum. Í roynd og veru eru eingir litir innanveggja: Alt er bara úr træi - trælitir.

- Eg protesteraði móti at nakað skuldi málast herinni, sigur hann.

Eg seti meg við borðið. Tað er mín sann eisini úr træi og bonkurin við. So hugnaligt, heitt og heimligt inni í hesum sermerkta húsinum.

### Krevjandi spurningur

- Tú, ja. Hvat vilt tú vita?, er fyrsti spurningur hansara til mín.

Tað var nú eg, sum var komin at seta honum nakrar spurningar. Men sama ger.

- Jú, sært tú. Tað at hava givið so nógvar áhugaverdar bøkur út í so mong ár - hvussu kom tað í lag?

Eg fái ikki svarið beinanvegin, tí hann skal fyrst festa sær í Amulet-sigarina. Við tryggum handalagi fær hann sigarina úr pakkanum, og festir sær síðani í við tendraranum.

Hann fær sær ein góðan guv av sigarini og blæsir myndiga roykin upp í loft. Einki við at blása roykin yvir matin og kaffi, sum á borðinum stendur.

- Hatta er ein krevjandi spurningur, og hann krevur eitt langt svar. Vit mugu eisini fara langt aftur í tíðina, heilt aftur til barnaár míni, sigur Emil.

### Illir við íslendingar

Emil byrjar síðani eina frásøgn um íslendingar, íslendska søgu og íslendska megi, - ein veruleika, sum ikki allir føroyingar hildu so nógv um. Hesa løtuna verður blaðið Dimmalætting ofta nevnt, tí tað fór so illa við íslendingum og avrikum teirra tá í tíðini.

- Eg helt sjálvur, at tað var sera løgið at eitt føroyskt blað skuldi fara so illa við einum fólki, sum var brøðratjóð okkara. Eg meini, hetta fólkið býr í einum landi, sum varð mett sum 5. besta landið í verðini.

- Var tað nakað sum eyðkendi tey, so var tað áhugin fyri málinum, mentanini og bókmentunum. Hetta sama vildi eg eisini sleppa at geva føroyingum, og tí fór eg undir at geva út bókurnar gjøgnum Bókagarð, sigur Emil.

Fyri hann var greitt, at skuldi hann røkka hesum málinum, so mátti tað gerast við at útvega børnunum og teimum ungu góðar føroyskar bókmentir. Á henda hátt kundu tey vaksa so at siga upp við hesum bókmentunum, heilt frá barnsbeini av.

Vit hava nú sitið saman og drukkið kaffi eina góða løtu, og eg skilji, at hann hevur hug at fara innar í stovuna at seta seg í sofuna.

Hóast sín høga aldur fer hann heldur lættliga á føtur, og við sínum eyðkenda svarta stavi fer hann fram við borðinum og innar í stovuna.

Millum stovuna og køkin er ein heldur høg gátt fyri ein 90 ára gamlan mann. Men tað bilar einki, tí lættliga fer hann upp um hana og setur seg í sofuna.

### Sumbiar-hjarta

Hann setur seg í sofuna, festir sær í enn eina sigar, og sigur seg vilja vísa mær eina samrøðu, sum